





*Framhald av síðu 51*

sum heild. Nýggjasta Mikines-útgávan higartil við tekstum eftir Bent Irve og Bárð Jákupsson kom í 2003 í sambandi við eina Mikines-framsýning í m.a. Kastrupgårdsamlingen. Fleiri áhugaverdir tekstir finnast um málaran, sum m.o. William Heinesen, Preben Wilmann, Ole Jacobsen, Bent Irve og Bárður Jákupsson hava skrivað. Hesin seinasti skrivaði eisini tekstin í stóru Mikinesbókini, ið kom út í 1990, sum tó at hann í støðum er heldur stuttur og brotakendur, er sakligur og góður og heldur seg til listina hjá Mikines. 1973 kom bókin hjá Ernst Mentze, sum nógv er kjakast um og sum var nakað væl meira persónlig, enn vit hava verið von við í Føroyum. Bókin er ævisøgulig og sera undirhaldandi og forvitnislig at lesa, hóast lesarin av og á fær eina heldur ótespiliga kenslu av, at áhugin gerst meira privat nærgeingin enn listarliga grundaður. Óansæð hevur bókin stórt virði sum beinleiðis kelda vegna tey mongu brøvini frá brævaskifti Mikines´ við m.a. læraran, Ejnar Nielsen og familjuna og tær mongu samrøðurnar við máláran, ið alt verður endurgivið í bókini. Lítið er at ivast í, at tað er Mentze, sum er tann mest umráðandi keldan hjá Aðalsteinn Ingólfsson í áðurnevnda formæli, ið er grundað á frágreiðing hjá Mikines um deyða faðirins. Eisini í restini av tekstinum verður Mentze dúgliga nýtt sum kelda og tað er spell fyri ein lesara